# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stríð um sendistovur

Tað er fallið Edmundi Joensen og ivaleyst fleiri fyri bróstið, at uttanríkisráðharrin hevur tikið av einum íslendskum tilboð um innvist á íslendskum sendistovum eitt nú í Moskva. Atfinningin gongur uppá, at ein tílík skipan gongur beint ímóti føroyskum áhugamálum. Tað sigst vera løgið við at vilja brúka íslendsku sendistovuna í Moskva og samstundis nokta at brúka donsku sendistovuna har. Hetta so mikið meira, sum uttanríkisráðharrin hevur boðað frá, at vit ikki fara at nýta sendistovur Danmarkar framyvir.

Edmund Joensen er sambandsmaður, og tí er tað natúrligt, at hann óttast fyri, at ein skipan við føroyskum deildum á íslendskum sendistovum kann gerast ein hóttan móti ríkisfelagskapinum. Aðrir viðmerkjarar hava eisini verið frammi við hvøssum viðmerkingum, eitt nú Rolf Guttesen, meðan onkur annar er farin í hernað til tess at verja Jørgen Niclassen.

Tað er ikki óvanligt, at lond samstarva um sendistovur og um høli til sendistovur. Norðurlond hava t.d. felags sendistovuhús í Berlin og á Norðurbryggjuni húsast íslendsku, grønlendsku og føroysku sendistovurnar undir somu lon. Sostatt eru fysisku karmarnir ikki í sjálvum sær nøkur hóttan, og tað ber sjálvandi til at innrætta seg soleiðis, at húsfelagararnir ikki fáa atgongd til loynidómar landsstýrisins.

Hetta mál snýr helst um okkurt annað enn praktiskar ítøkiligar trygdarpolitiskar spurningar. Hetta man snúgva seg eins nógv um politikk og um tað symbolvirði, sum ein skipan við sendistovusamstarvi fevnir um. Við sendistovusamstarvi við Ísland sendir føroyska uttanríkisráðið út eitt politiskt signal við sterkum tjóðskaparligum innihaldi nevniliga, at alt ljósið liggur ikki í landsuðri. Ein kann sjálvsagt altíð umrøða, hvørt hetta er skilagott ella praktiskt ella beinleiðis skaðiligt, sum onkur vil vera við. Við ætlaðu skipanini vísa vit dønum og umheiminum, at vit ikki sláa hondina av okkara vinum og vit senda Danmark eitt klárt signal um, at tykkara diplomatiski stuðul kundi verið nógv størri og betri. Vit hugsa her um, hvussu trekt tað hevur gingið at sleppa uppí ymsar ES skipanir, har Danmark ivaleyst kundi havt lagt trýst á ES.

Tað er einki. sum forðar okkum í framvegis at nýta danskar sendistovur, har tað er mest gagnligt og mest praktiskt. Hetta gera vit í dag, men okkurt kundi bent á, at henda skipan kundi rigga betur. Er nakað um tað, kann ein slík skipan, sum Jørgen Niclasen umhugsar, bert gagna og geva dønum nakað at hugsa um. Tað sum, tá samanumkemur, umrøður, er, at vit velja loysnir og skipanir, sum gagna føroyskum áhugamálum mest og best. Vit mugu kunna rokna við, at avgerð uttanríkisráðharrans snýr seg um annað og meira enn signal- og súmbolvirði. Vit mugu sjálvsagt rokna við, at uttanríkisáráðið hevur ítøkiligar orsøkir at halda, at ætlaða skipanin við íslenska sendistovusamstarvinum fer at gagna føroyskum áhugamálum. Uttanríkisráðið eigur tí sum skjótast at kunna almenningin um, hvussu og á hvønn hátt ætlaða skipanin fer at gagna føroyskum áhugamálum sum mest og sum best.

**Sosialurin**

## Mín tímaløn svarar til arbeiðaraløn

**ELIN BRIMHEIM HEINESEN**
stjóri í SamViti



Eg vil fegin spyrja Snorra Fjalsbak, stjóra á Lønardeildini, hvat hann meinar við, tá hann týsdagin 18. november úttalar seg í Sosialinum um, at undirritaða fær "nokk av løn" - væl vitandi, at mín løn er væl lægri enn, hvat fleiri aðrir almennir stjórar fáa. Eg vil eisini spyrja hann, hvat hann meinar við, tá hann ikki metir mítt stjórastarv at vera líka "tungt" sum onnur almenn stjórastørv. Hvat byggir hann hesar niðurstøður á?

**Hvat er "nokk av løn" til stjóran í SamViti?**
Eg vil heldur spyrja: Hvat er ein rímilig løn í mun til arbeiðsbyrðuna, ábyrgdina og professionellu bakgrundina hjá stjóranum? Hetta kann bara metast í mun til, hvat lønarstøðið í samfelagnum annars er. Er tað t.d. rímiligt, at stjórin í SamViti fær eina tímaløn, sum svarar til eina vanliga arbeiðaraløn?

Eg havi roknað út, at um eg t.d. var arbeiðari við minstuløn og arbeiddi líka so nógvar tímar, sum eg vanliga arbeiði í meðal, hevði ein sannlík løn ligið um 40.549,62 kr. um mánaðin. Tað er heldur reglan enn undantakið, at eg arbeiði um 300 tímar um mánaðin, sum svarar til uml. 66-67 tímar um vikuna. Við eini vanligari arbeiðsmanna minstuløn uppá 106,85 kr. + yvirtíð (tað svarar í meðal til 135,17 kr. um tíman, tá yvirtíð er roknað uppí) hevði eg fingið eina løn uppá 40.549,62 kr. um mánaðin. (Um Snorri Fjalsbak vil síggja detaljurnar í útrokningini, skal hann vera vælkomin til tað).
Sum kunnugt fái eg eina løn uppá 39.215,79 kr. um mánaðin + eftirløn, so tað er ikki langt við síðuna av, tá eg sigi, at eg ikki tjeni meira enn ein vanligur arbeiðari í mun til arbeiðstíðina.

**Endurspeglar hvørki ábyrgd, arbeiðsbyrðu ella bakgrund**
Haraftrat skal havast í huga, at eg sum sagt fái væl minni í løn enn aðrir almennir stjórar. Eg haldi ikki, tað á nakran hátt er órímiligt av mær at forvænta eina hægri løn enn 37. lønarflokk, tá ein samanber við, at almennu stjórastørvini t.d. í Landsverki, á Postverkinum og í Strandferðsluni liggja í 39. lønarflokki, meðan stjórastarvið í Heilsufrøðiligu Starvsstovuni liggur í 38. lønarflokki. Hvat er so argumentið fyri at flokka stjórastarvið í SamViti í 37. lønarflokk?
Tá ein samanber við, hvat stjórar í privata vinnulívinum tjena (ella bara við tímaløn hjá hondverkarum) og tekur bæði arbeiðstíð, ábyrgd, tyngd/tign av starvinum og kanska samfelagsvirði av avrikinum hjá stovninum, sum ikki kann mátast ítøkiliga, men sannlíkt óbeinleiðis svarar til milliónir, umframt tað trýst, ein sum almennur stjóri má finna seg í frá politikkarum og miðlum, har júst mítt starv kanska er meira ábart enn tey flestu, so meti eg meg at vera nógv undirlønta. Lønin endurspeglar hvørki ta ábyrgd, eg havi, ella svarar til, hvat eg meti meg hava uppiborið av rímiligari viðbót fyri tað arbeiðið, eg útføri, ella til ta professionellu bakgrund, eg havi frammanundan.

**Ikki kappingarførar lønir**
Nakað heilt annað, sum eisini er viðkomandi í hesum føri, er, at tað kann gerast ein trupulleiki fyri tað almenna, um ikki tað kann bjóða sínum stjarvsfólkum eina kappingarføra løn - ikki minst í mun til útlandið. Almennir stovnar líða í heila tikið undir, at tað er torført at fáa kvalifiseraða arbeiðsmegi. Vinnulívið rópar eftir góðum leiðarum, og tað sama ger tað almenna. Vit hava nógvar vælkvalifiseraðar útisetar, men sum aftra seg við at koma heim, tí lønirnar ikki eru kappingarførar. Um t.d. leiðarastørvini ikki gerast meira attraktiv, fer tað veruliga at knípa við at halda Føroyar á einum nóg høgum professionellum støði í mun til onnur lond og gera Føroyar til heimsins mest attraktiva og kappingarføra samfelag í mun til arbeiðsmegi.

## "Mestsum ov føroyskt av føroyskum at vera"?

**KÁRI LEIVSSON**



Nú vit skulu hava danskan serfrøðing at hjálpa okkum at spreiða brandaðan samleika kring knøttin, hevur tað alstóran týdning at finna fram okkara sereyðkenni. Og sanniliga sanniliga hómaði eg ein dagin nakað, ein neyvan upplivir nakað annað stað á hesum sama knøtti. Kunnu tit ímynda tykkum, at ein ummælari í Danmark, Svøríki, Noregi, Finnlandi, Íslandi, Bretlandi, Týsklandi, ella tó víðari varð leitað, hevði skrivað nakað soleiðis "vandin er at málið í leikinum gerst ov danskt, ov svenskt, ov norskt, ov finnskt, ov enskt, og týskt osfr...??"
Nei - her hava vit so sanniliga eitt sereyðkenni at hefta upp í okkara brandaða samleika tá hann skal gerast globalur.
Vit hava stutt sagt æruna av at vera einasta tjóð í heiminum sum skammast av sínum egna máli!
Tað má ikki vera "ov reint" og fyri alt í verðini ikki "ov føroyskt" - hvat tað so enn kann vera fyri nakað.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.